Samdir um at bí›a til næsta summar

Fiskimannafelagi› ætlar nú at fáa pensónsvi›urskiftini hjá fiskimonnum í rættlag. Nú ver›ur í fyrstu atløgu bí›a› eftir landsst‡rinum

Fiskimannafelagi› og Rei›arafelagi› bí›a eftir einum útspæli frá Landsst‡rinum

SÁTTMÁLA-SAMRÁ‹INGAR

Áki Bertholdsen

Ta› ver›a ongar samrá›ingar ímillum Fiskimannafelagi› og Rei›arafelagi› um n‡ggjan sáttmála fyri fiskimenn nú um ársskifti›, sum ta› annars hevur veri› vanligt.

Sáttmálin ímillum Rei›arafelagi› og Fiskimannafelagi› skuldi annars ganga út 30. november, men partarnir eru samdir um at leingja sáttmálan til 1. juni. Óli Jacobsen, forma›ur í Fiskimannafelagnum, sigur, at orsøkin til, at sáttmálin er longdur, er, at teir vilja hava at vita, hvat Landsst‡ri› ætlar í pensjónsmálinum.

– Landsst‡ri› hevur nú í nøkur ár bo›a› frá eini n‡ggjari pensjónsskipan. Enn er hon ikki komin. Men nú er hon so frábo›a› einafer› afturat, sigur Óli Jaobsen.

Hann sigur, at útspæli› hjá Landsst‡rinum í pensjónsmálinum fer uttan iva at fáa ávirkan á samrá›ingarnar.

– Tí hev›i ta› veri› sera óheppi› at fara undir samrá›ingar um n‡ggjan sáttmála, nú ta› kanska bara eru nakrir fáir mána›ir, inntil eitt útspæl kemur frá Landsst‡rinum í pensjónsmálinum.

– Tá i› Landsst‡ri› hevur gjørt av, hvat skal henda á pensjónsøkinum, ver›ur stø›a tikin til samrá›ingarnar útfrá tí.

Vilja hava pensjón

Í hesum liggur eisini, at Fiskimannafelagi› hevur sett sær fyri at fáa pensjónsvi›urskiftini hjá fiskimonnumn í rættlag.

– Pensjónsmáli› ver›ur ra›fest ovarliga hjá Fiskimannafelagnum. Og ta› liggur í kortunum, at ta› er eitt mál, sum ætlanin var at taka upp, tá i› samrá›ingar ver›a aftur.

– Men ta› ber ikki til at gera ta›, fyrrenn vit vita, hvat landsst‡ri› ætlar á pensjónsøkinum, tí ta› fer sjálvandi at fáa t‡dning fyri samrá›ingarnar.

Ætla at stytta tí›ina

Annars ætlar fiskimannafelagi› eisini at tí›in, sum Fiskimenn kunnu vera burtur, skal styttast enn meiri.

– Fyri tveimum árum sí›ani fingu vit tí›ina, sum menn kunnu vera heimanífrá, stytta› úr fimm mána›um, ni›ur í f‡ra mána›ir.

– Men vit halda framvegis, at ta› er ov leingi at burtur í f‡ra mána›ir út í eitt. Ta› hoyrir ikki nútí›ini til, at menn skulu ver›a burtur ein tri›ing av árinum í senn, og tí ætla vit at fáa tí›ina stytta› enn meiri, næstu fer›, vit samrá›ast.

Men ta› er yvirhøvur ikki vist, at samrá›ingar ver›a í summar, tí ongin sigur enn, at sáttmálin yvirhøvur ver›ur sagdur upp til 1. juni.

– Fyribils er sáttmálin bara longdur. Tá i› ta› lí›ur út, taka vit stø›u til, antin hann skal sigast upp, ella ikki.

Annars hava tey f‡ra manningarfeløgini, Fiskimannafelagi›, Skipara- og Navigatørfelagi›, Maskinmeistarafelagi› og Motorpassarafelagi› samrá›st í felag hesi seinnu árini.

Men ta› ver›ur so hesufer›. Maskinmeistarafelagi› hevur sagt sáttmálan upp og fer undir samrá›ingarnar nú, sum vanligt. Skipara- og Navigatørfelagi› hevur als ikki sagt sáttmálan upp, so hann er galdandi eitt ár afturat Og Motorpassarafelagi› hevur heldur ikki sagt sáttmálan upp, so hann er galdandi í tvey ár afturat.

Nevndin í Lærarafelagnum standa skúlarætt

Nakrir av yngru lærarunum eru ónøgdir vi› n‡ggju tryggingina, sum nevndin í Lærarafelagnum fyri stuttum hevur tekna›. Spurna›artekin ver›ur sett vi›, um sáttmálin yvirhøvur er undirskriva›ur. Teir halda ikki, at kunningin hevur veri› nøktandi og hava tí sett nevndini ein fyrispurning

SAMLAGSTRYGGINGIN

Stefan í Skorini

Í opnum brævi til Lærarafelagi› hevur ein bólkur av lærarum sett fram fyrispurning vi›víkjandi n‡ggja sáttmálanum, sum nevndin hevur tekna›. Hóast sáttmálin var› samtyktur á a›alfundi, halda ungu lærararnir ikki, at nevndin hevur gjørt sítt arbei›i til lítar.

– Fyrispurningurin sn‡r seg um sjálvan sáttmálan, sum er gjørdur vi› LÍV. Sáttmálin er ikki komin út til limirnar, og man hevur als ikki sæ› sáttmálan, hvat hann í veruleikanum gongur út uppá. Hann er nógv broyttur frá tí gamla sáttmálanum, og á a›alfundinum, tá hann var› samtyktur, var› sjálvur sáttmálin ikki lagdur fram, sigur Magnus Tausen, sum er vi› í einum bólki vi› eini átta lærarum, i› hevur sett fyrispurningin.

Teir síggja ongan fyrimun vi› n‡ggju ískoytiseftirlønini, sum er ein partur av samlagstryggingini, men vísa hinvegin á, at teir missa nógvan pening yvir eitt longri tí›arskei› vi› at vera vi› í hesi skipan.

Er sáttmálin galdandi?

– Kunningin frá Lærarafelagnum hevur veri› so miki› vánalig, at ta› hava vit átiki› okkum at gera, og nú hava limirnir sæ›, hvat sáttmálin gongur út uppá, sigur Magnus Tausen.

– Ta› vísir seg, at ta›, sum vit hava fingi›, hvørki er dagfest ella undirskriva›, og tí er spurningurin, um nakar sáttmáli yvirhøvur er undirskriva›ur. Vit vita ikki, um Fíggjarmálast‡ri› hevur gó›kent sáttmálan, og um hann er endaliga undirskriva›ur, ella um hann enn bara er fyribils, sigur Magnus Tausen.

– Um ónøgd er vi› sáttmálan, og hann framvegis ikki er undirskriva›ur, so er ta› eitt gott høvi at bøta um sáttmálan, sigur Magnus Tausen.

Í fyrispurninginum ver›ur spurt um sáttmálin er undirskriva›ur, og um so er, hvør hevur skriva› undir, og nær hann ver›ur settur í gildi.

Enn er ikki greitt, um nevndin fer at svara fyrispurninginum, og hon hevur ikki svara fyrra fyrispurninginum enn, sum bólkurin av lærarum hevur sett.

– Ta›, sum er ógvuliga tyngjandi fyri nevndina, er, at høvu›sma›urin í samrá›ingunum fer frá um stutta tí› og fær sostatt eitt útgjald á 100.000 krónur. Hann og nakrir av limunum fáa sostatt eitt sera gott persónligt úrslit, sigur Magnus.

Bólkurin vísir á, at samrá›ingarmannagongdin hevur veri› ivasom, tí ein persónur hevur ført samrá›ingarnar, og nakrir persónar í nevndini hava fingi› eitt gott úrslit.

Gjørt útrokningar

Yngru lærararnir hava gjørt heimaarbei›i› til hesa uppgávuna, og teir hava fingi› útrokningar til vega, sum vísa, at ta› als ikki loysir seg hjá einum ungum lærara í hesi skipanini.

– Vit fara at leggja onkrar uppsparingarútrokningar frá peningastovnunum fram. Eina alternativa uppsparing, sum vísir, hvat ein lærari kundi fingi› burturúr, um hann gjørdi egna uppsparing.

Lærararnir eru spentir, um Lærarafelagi› fer at svara fyrispurninginum, og teir ætla sær at arbei›a ví›ari vi› hesum málinum. Magnus Tausen sigur, at ta› kann enda vi›, at undirskiftir ver›a savna›ar til ein eyka a›alfund vi› tí endamáli at endursko›a sáttmálan.

– Ónøgd er heilt avgjørt millum lærararnar, og trupulleikin er heilt einfalt, at vit vita ov líti› um hesa tryggingina. Ongar útrokningar vór›u lagdar fram á a›alfundinum, og eingin talva var› víst. Dentur var› lagdur á eitt dømi, har ein kvinna sat eftir vi› børnum eftir eitt dey›sfall. Tí var› sáttmálin sjálvandi samtyktur.

Magnus Tausen heldur ikki, at hetta var serliga sakliga gjørt, tí um vilji var til at kunna allar limirnar, so vóru vansarnir vi› sáttmálanum eisini komnir til sjóndar

– Nevndin sigur, at hetta er gjørt í besta fakfelagsanda, men spurningurin er, hvussu langt tú vilt toyggja henda fakfelagsanda, tí onkur hevur eitt roknistykki, sum er 200.000 krónur eftir reyv. Eitt fakfelag kann ikki loyva sær at binda limirnar á ein slíkan hátt, sigur Magnus Tausen.

Ynski hjá bólkinum er, at fáa eftirlønarískoyti har pipari› grør, og halda fast vi› tryggingina.

– Vit halda, at Lærarafelagi› skal hava eina trygging, sum er eins fyri allar limirnar, sigur Magnus.

Sjómansskúlin li›ugt útbygdur

Í simulatorrúminum eru tríggir n‡ggir videoskíggjar settir upp

Mynd: Jens K. Vang

Útbyggingin av Føroya Sjómansskúla er nú li›ug, og landsst‡risma›urin í undirvísingar- og mentamálum fer í dag at handa sjómansskúlastjóranum lyklarnar til skúlan

Edvard Joensen

Seinnapartin í dag fer Dánjal Johan Poulsen, sjómansskúlastjóri, alment at taka í móti lidna Sjómansskúlanum frá einum av sínum gomlu næmingum, landsst‡rismanninum í undirvísingar- og mentamálum, Torbirni Jacobsen.

Føroya Sjómansskúli er nú endiliga li›ugt útbygdur í hesum umfari. Og seinnapartin í dag millum klokkan 15 og 18 ver›ur samkoma fyri innbodnum á skúlanum, har gestirnir umframt at vera vi› til sjálva yvirtøkuna eisini sleppa at síggja skúlan. Seinni ver›ur so høvi hjá almenninginum at síggja skúlan, ver›ur sagt í tí›indaskrivi frá Føroyua Sjómansskúla.

Føroya Sjómansskúli flutti í 1962 í bygningin, skúlin framvegis húsast í. Men ta› var skjótt, at greitt var, at umstø›urnar vóru ov trongar. Næmingatali› vaks, og virksemi› øktist, og longu í 1978 var› tí fari› at tosa› um at byggja út, tí virksemi› var vaksi› so nógv, og hølisvi›urskiftini ikki vóru nøktandi.

Men her, sum so manga a›rasta›ni, var ov nógv tosa› og ov líti› gjørt. Tí ein sera átro›kandi útbygging dró út. Væl var uppskot um útbygging gjørt og gó›kent í 1983. Projektera› var›, og pengar vór›u settir í grunn. Men í 1987 var› alt ste›ga›. Og hóast onkrar hissini umbyggingar vór›u gjørdar, var› einki av nakrari útbygging.

Tíggju ár gingu so, til landsst‡ri› endiliga fekk tiki› seg saman til at seta eina bygginevnd, sum skuldi skipa fyri eini veruligari útbygging av Føroya Sjómansskúla, sum muna›i naka›.

Hendan útbyggingin, sum nú er li›ug, fevnir um ein tilbygning upp á 860 fermetrar. Umframt er spildurn‡tt st‡rihús gjørt, og onkrar smærri broytingar innan, sum gera, at samla›a fermetratali›, sum umfata› er av útbyggingini, kemur upp á 1.200 fermetrar.

Gamla instrumentrúmi› á brúnni er rudda› og ver›ur nú brúkt til skei›virksemi, fundir og tílíkt. Brúgvin er útbygd munandi. Hon er gjørd størri, n‡ggj trappa er gjørd, og veranda er rundan um. Innan er brúgvin heilt n‡móttans. Útgjørd vi› teimum n‡ggjastu tólunum, sum eru, umframt at hon er sett í smband vi› simulatorrúmi› í ne›ra. Tríggir framkomnir videoskermar eru eisini ni›ri í simulatorrúminum. Hesar n‡íløgurnar hevur A.P.Møller-grunnurin fíggja›.

Næmingatali› á skúlanum hevur seinnu árini ligi› rættiliga stø›ugt umlei› teir 100, ver›ur sagt í tí›indaskrivi frá skúlanum. 17 eru lærararnir í tali.

Skipsføraraútbúgvingin, sum er tann hægsta, skúlin letur, tekur tr‡ ár. Men ávegis ver›a tvey onnur prógv latin. Eftir fyrsta ári› er næmingurin vor›in heimaskipari. Hálvtanna› ár tekur at at útbúgva seg til skipara, og tá næmingurin so hevur gjøgnumført øll tr‡ árini, er hann vor›in skipsførari.

Men »et er søkort at forstå, et andet skib at føre.« Hóast næmingurin hevur loki› tr‡ ára útbúgvingina, er hann ikki rætiliga leysur av skúlanum, fyrr enn hann hevur veri› ígjøgnum eina rúgvu av skei›um. Ta› kunnu ver›a trygdarskei›, siglingarskei›, telduskei›, brandskei› og mong onnur, sigur Føroyua Sjómansskúli í tí›indaskrivi.